## Viðmerkingar

# Barnaansingin er ein uppgáva

*-ikki ein trupulleiki*



Javnaðarflokkurin ynskir at broyta lógina um barnsburðarfarloyvi, soleiðis at møguligt verður at vera heima hjá barninum í tvey ár við løn. Kortini ásannar flokkurin, at farloyvi einans er 24 vikur í dag. Tí er fremsta málið í hesum býráðsvalskeiði, at arbeiða fyri 100% dekningi á barnaansingarøkinum, fyri børnum í aldurbólkinum _-9 ár. Dagansingarskipanin skal útbyggjast, soleiðis at øllum er pláss í boði, um tørvur er á tí. Og um foreldrini hava serlig ynskir, so sum útibarnagarð ella bussbarnagarð, so skal valmøguleikin vera til har.

**Somu sømdir til øll**
Høvuðsendamálið við barnaansingarpolitikkinum má vera, at tryggja øllum borgarum somu sømdir. Eitt tilboð um pláss í tí stovni, sum foreldrini hava ynskt. Tað er blóðskeivt at einans nakrir borgarir skulu fáa valuta fyri skattapengarnar, meðan onnur vera sett á bíðilista, har tey kunnu koma at bíða í áravís. Tí, hvørjar treytir skulu fólk so uppfylla fyri at fáa eitt pláss í boði? Skulu tey vera kálvaknýggjað, hava rætta eftirnavnið ella vera fødd í január?

Øll gjalda skatt, og hava rætt til somu sømdir. Vit høvdu ikki lati okkum lynda, at staði í bíðirøð í fleiri ár, fyri at sloppi við einum býarbussi ella at læna á býarbókasavninum.

Vit hava tíverri vant okkum so nógv við, at tá vit veruliga hava tørv á valuta fyri skattapengarnar, so sum almennahjálp, barnaansing, bústað ella røktarpláss, so er tað ein sjálvfylgja at vit bíða. Men tað er skeivt, tí tá avgerð er tikin um at hava eitt tilboð til borgararnar, so skal hetta tilboð umfata øll.

Javnaðarflokkurin vil stríðast fyri, at býráðið viðurkennir sær sína ábyrgd í barnaansingarspurninginum og bindir seg til at veita øllum børnum eitt gott ansingartilboð — soleiðis at allir borgarar verða javnsettir. Her skal ikki bera til at skáka sær undan. Býráðið má seta tað av á fíggjarætlanini, sum krevst. Kommunal tilboð skulu ikki verða ein framíhjárættur hjá nøkrum útvaldum, men ein rættur hjá øllum borgarum.

**Rigmor Dam,**
**valevni hjá Javnaðarflokkinum**
**til býráðsvalið í Havn**

*Tíðindaskriv frá Ráðnum fyri Ferðslutrygd:*

## Norðskálatunnilin í tingið

Alfred Olsen, løgtingsmaður, hevur sett Bjarna Djurholm, landsstýrismanni, fyrispurning um trygdina í Norðskálatunnlinum. Alfred Olsen kallar tunnilin eitt myrkt kolanám og vísir á, at síðani 1976 eru 860 tons av tilfari dottin ella reinsaði undan loftinum í tunnlinum.

Tunnilin er sera myrkur og vátur, og koyribreytin er uppslitin. 2000 bilar koyra dagliga gjøgnum tunnilin, og nú allur inn- og útflutningur í framtíðini skal gjøgnum Havnina, so verður tunga ferðslan uppaftur størri. Kostnaðurin av mest neyðugu ábótunum verður mettur til umleið 9 miljónir.

Alfred Olsen hevur spurt landsstýrismannin, um hóskandi upphædd verður sett av til tunnilin á komandi løgtingsfíggjarlóg, og løgtingið hevur samtykt, at landsstýrismaðurin skal svara fyrispurninginum.

# Teir reistu ein kross

Lech Valesa og nakrir av hinum monnunum á stóru Gdansk skipasmiðjuni í Pólandi høvdu reist ein risa stóran kross á einum heyggi. Krossurin var sveisaður saman úr rustfríum stáli. Við hvørja síðu á risa krossinum stóð ein lítil krossur.

Teir reistu henda kross sum eitt tekin uppá teirra kristna grundstøði og tí frælsi, teir stríddust fyri at fáa.

Men valdsharrarnir komu eftir teimum. Menninir vórðu avbukaðir, settir í fongsul og familjur teirra



hóttar eftir lívinum. Men krossin tordu valdsharrarnir ikki at taka niðuraftur.

Býráðsvalið er eitt val til fólkaræði hvar nærdemokrati og sambandið ímillum tann fólkavalda og borgaran kanska er tættast. Býráðsvalið er eitt val, hvar nógv viðurskifti koma upp á tal: eldrarøkt, barnarøkt, vegagerð o.s.fr. Men fortreytin fyri hesum er at vit verja fólkaræðið.

Hvønn sunnumorgun síggjast polakkarnir á skipasmiðjuni fara niðan í katólsku kirkjuna í Havn til gudstænastu. Teir kunnu gera hetta, tí teir liva í einum fríum samfelag.

Fólkaflokkurin veit, at frælsi ikki er ein sjálvfylgja. Fólkaflokkurin veit, at tað eru kreftir, sum við snildisligum uppskotum vilja koma persónliga frælsinum til lívs.

Persónligt frælsi og fólkaræði – tað er tað, sum býráðsvalið snýr seg um.

Vinarligast,

**Bjarti Mohr, valevni hjá Fólkaflokkinum**

# Schumann Hjaltalin undrast!

Schuman Hjaltalin undrast á, at fólkafloksumboðini í býráðnum vildu kunna býráðslimir og borgarar í Tórshavnar kommunu um Fjarhitafelagið, sum allir borgarar eiga, og sum ta seinastu tíðina hevur verið nógv umtalað í fjølmiðlunum. Vit í Fjarhitafelagnum hava einki at krógva, og ei heldur eg sjálvur, tí hevur Fólkaflokkurin biðið um, at ein frágreiðing skal koma frá felagnum til borgaran.



Ja, Schumann Hjaltalin, ikki hevði eg trúð, at tú undrast, hvussu ofta havi eg ikki hoyrt teg gjørt vart við, at tú ert ov lítið kunnaður um ymisk mál.

Eg kann vissa Schumann Hjaltalin og øll onnur um, at henda frágreiðing er ikki umbiðin fyri at Páll Petersen skal fáa eina frágreiðing frá Páll Petersen, men fyri at borgarin skuldi fáa innlit í viðurskiftini. Ætlanin var, at hetta skuldi viðgerast á opnum býráðsfundi, men varð hetta ikki til veruleika, tí aðrar kreftir í býráðnum ynsktu hetta ikki, og verður málið tí tikið upp á lukkaðum fundum.

**Páll Petersen,**
**býráðslimur**

# Eldrasambýlini ein góð loysn

At Tórshavnar kommuna bert hevur eitt eldrasambýli, vísir í høvuðsheitum eitt sindur um, hvussu ein raðfestir tey ymisku økini.

Tað er ongin loyna, at út frá kanningum, ið eru gjørdar eitt nú í Norðoyggjum, so er eitt pláss á einum eldrasambýli 50% bíligari enn á einum røktarheimi.

Fyrimunurin við hesari loysn er eisini tann, at tey somu starvsfólk, ið hava gingið til brúkaran úti í heimunum, fylgja við inn á sambýlið, og ger tað tað lættari hjá teimum gomlu at fella til.

Grundtankin við sambýl-



um er tann, at tað skal líkjast so nógv sum møguligt einum vanligum heimi. Um rætt varð borið at, so høvdu vit havt minst 4 eldrasambýli í Tórshavnar kommunu.

Vit skulu minnast til, at tað í dag ein ein sera stórur tørvur á hesum økinum, og nú ein meir og meir tosar um at eldrarøktin skal leggjast út til kommunurnar, so skuldi møguleikin verið sera stórur fyri at nøkta ein stóran part av tí tørvi, ið er í dag, við at keypt/bygt nøkur eldrasambýlir, har fólk við vanligum ellisbrekum kundu fingið eitt pláss.

Somuleiðis er eisini tann fyrimunur við eldrasambýlum, at tey gomlu sleppa at verða við í øllum tí dagliga, eftir førimuni, soleiðis at tey fáa nýtt síni evnir.

Sjálvandi skuldu sum áður nevnt verið minst 4 eldrasambýlir í Havn, tí tá fleiri av teimum smáu kommununum í landinum klára at reka sambýli eiga vit sum størsta kommuna eisini at raðfesta hetta øki so tað munar.

**Ása Olsen, valevni**
**Sjálvstýrisfloksins**
**til býráðsvalið**

# Íbúðarbygging í Havnar kommunu

Eftirspurningurin eftir íbúðum hevur ongantíð verið størri enn nú. Bíðilistin eftir grundstykkjum er væl oman fyri hundrað og planløgd raðhús verða seld, longu áðrenn tey eru bygd.

Støðan hjá teimum ungu, ið skulu seta búgv, er vónleys, tí tey fáa onki at búgva í.

Tað sama er galdandi fyri tær ungu familjurnar, ið hava starvast uttanlands og nú hava fingið tilboð um arbeiði í Havnini og skulu flyta heim, tey hava heldur onki at búgva í.

Nakað má gerast við hendan spurning og tað ongantíð ov skjótt.

Ein loysn er at fara undir at byggja stór íbúðarhús við nógvum íbúðum. Hesin byggiháttur hevur higartil ikki haft stóran áhuga í Føroyum. Men tíðir broytast og fólkið eisini.

Um arkitekturin formgevur byggingina við atliti til landslagið, so verður náttúrumyndin ikki oyðiløgd og umhvørvið heldur ikki.

Eitt slíkt stig fer beinanvegin at skapa fleiri nútíðarhóskandi tilboð, bæði til ung og gomul.

Við hesum byggihátti fáa tey ungu møguleika at útvega sær antin leigara- ella eigaraíbúð, og tey eldru kunnu - um tey ynskja tað - skifta úr sethúsum til íbúð.

Fólkaflokkurin arbeiðir bæði fyri tað unga og tað eldra ættarliðið.

**Hans Biskopstø**
**valevni hjá**
**Fólkaflokkinum**



## Viðmerkingar

# Men eitt vantar í…

Upp til val koma uppskot frá valevnum, hvussu hesi vildu loyst teir ymisku trupulleikarnar, og ynskini frá veljarunum. Hetta er gott og náttúrligt. Ofta eru tað mál sum eru uppi í tíðini»in« sum havd verða á lofti. Hesaferð er tað barnaansingin sum er í »fokus« og er tað ikki undarligt.

Tí hetta er ein alstórur trupulleiki hjá foreldrum hvørs børn einki ansingarpláss hava. Hetta er ein uppgáva hjá komandi býráði at fáa loyst. Havast má í huga at fyrst nú í summar kom kommunan sambært lóg at hava hetta øki einsamøll at røkja. Hetta arbeiðið má gerast miðvíst, at fáa bygt stovnar eftir sama leisti so



at hesir verða so ódýrir sum møguligt, uttan at tað gongur yvir dygdina.

Somuleiðis sum barnaansingin kom undir tað kommunala øki, yvirtekur landið umsorganina fyri teim gomlu og eldru. Tað vil siga, at røktarheim og tílikar byggingar verða landsuppgávur. Hesi mugu ikki sleppast uppá fjall, tí neyðin innan hetta øki er líka so stór, ella størri, sum innan barnaansingina.

Kommunan má sum skjótast fara undir at byggja sambýlir, so tey ið illa eru før fyri at klára seg heima hjá sær sjálvum kunnu verða undir tryggari korum.

Hesar uppgávur eru ikki tær einastu uppgávur ið ein stór kommna sum Tórshavnar kommuna hevur at røkja. Dagligdagurin er eitt við sínum uppgávum, og nú Marknagilsvegurin verður liðugur til jóla, má haldast fram við hesi vegagerð út á Argir, og ikki helmast í fyrrenn úti á Hamaranum. Hetta er neyðugt um ferðslan, sum í løtuni er ein ruðuleiki har úti, skal ganga so ótarnað sum møguligt.

Vinnulívið má hava góð kor at virka undir, og ugu skapas tkarmar fyri hesum. Vinnulívið er trygdin fyri eini sosialari vælferð.

Lat ikki tína atkvøðu vanta í til sjálvstýrislistan, men lat 21. nov. verða ein sannan D-dag.

**Ronald F. Poulsen**
**býráðslimur og valevni**

# Læknahjálp

Í Havnini er stórt og álvarsamt **læknatrot**. Ongin tímur heldur at verða kommunulækni orsakað av **vána arbeiðsumstøðum**, **stressi** og yvirhøvur **væntandi samstarvsvilja** frá Býráðnum.

Havnin eigur at hava millum **12 og 15 læknar**. Hetta er eitt ófrávíkiligt krav skulu vit nøkta tørvin í skjótt vaksandi høvuðsstaðnum. Tað eru ikki meira enn **8 læknar** í Havnini sum er og eru hesi yvirhøvur ovbyrjaðir av arbeiði umframt at teirra arbeiðsumstøður



ikki eru nútímans og nøktandi uppá nakran hátt.

**Hetta er ein ótolandi støðu bæði fyri læknan og sjúklingin og sum borgarin í Havn ikki skal góðtaka.**

Við nóg nógvum Kommunulæknum og betur arbeiðsumstøðum verður teirra arbeiði munandi betur og vil hetta eisini minka um tørvin á hospitalsviðgerð. Samanumtikið vil hetta eisini verða ein sparing fyri sjúkrahúsverkið.

Vit taka okkara læknaskipan sum eina sjálvfylgju og at læknin altíð er væl fyri og tilreiðar at hjálpa.

**Men Okkara læknar eru eisini menniskur** sum tú og eg, latum okkum við hesum Býráðsvalinum **hjálpa teimum** ! Her skal prioriterast við lít.

Komið eg í Býráðið skal eg gera nakað við hetta mál.

**Johan Mortensen**
**Valevni til Býráðsvalið**
**fyri Tjóðveldi**

# Frágreiðing um fjarhitaveiting og sambandsgnýst

*Aftursvar til Schumann Hjaltalin*

Býráðið eigur helvtina av P/F Fjarhitafelagnum, ið veitir hita til flestu av húsunum í Hoyvíkshaganum. Nýtarnir av fjarhita eru sera ónøgdir. Býráðið hevur kravt, at húsini í Hoyvíkshaganum skulu verða íbundir fjarhitaskipanini. Tí fáa vit byráðslimir manga skoluna frá íbúgvum har. Er ákoyringin á okkum røtt ella ikki ? Fyri at fáa svara tí spurninginum, mugu vit býráðslimir vita hvat ónøgdin hjá fjarhitanýtarunum snýr seg um. Tá eg sigi vit, meini eg allir býráðslimir, eisini sambandsumboðini í býráðnum. Av tí at ein heilur býarpartur er ónøgdur við eina veitan, ið býráðið varar av, dittaðu vit í fólkaflokkinum okkum at spyrja, um býráðslimirnir ikki kundu fáa eina frágreiðing.

Tað toldi sambandsflokkurin ikki. Í hvussu er fekk onkur av teimum ógvuliga ilt av, at fólkafloksins fyri-



spurningur til býráðsformannin, var kunngjørdur í fjølmiðlunum. Hvør skal siga, tað er bert sambandsflokkurin, ið kann varpa fyrispurningar út til almenningin.

**Dømi 1** : Kommunusamskipan Føroya hevur fund, har møguleikin at privatisera SEV verður umrøddur. Sambandsflokkurin á gosi, og letur útbasunerað í allari føroysku pressuni, at teir krevja eyka býráðsfund fyri at fáa at vita hvat fyriferst. Eyka býráðsfundur verður hildin, og hvat?

Jú, sambandsflokkurin samtykkir at Kommunusamskipan Føroya skal halda fram við at kanna møguleikan at privatiserað SEV !!!

**Dømi 2** : Pressan veit at siga frá, at Tórshavnar Kommuna skal fáa eina snarskivu. Og fyri at greiða borgarunum frá, hvat snarskivan er, vil kommunan nýta rættuliga nógvan pening til eina lýsingarherferð. Sambandsflokkurin aftur á gosi, og letur fyri aðru ferð borgaranar, gjøgnum føroyska fjølmilaheimin, vita, at teir høvdu kallað saman til samgongufund um oyðsli til snarskivuherferðina hjá býraðsformanninum. Samgongufundur hevur verið, og hvat ? Jú, tveir dagar seinri kom snotilig avís í hvørt húsarhald í kommununi um snarskivuna.!!!

Vinarliga

**Jan Christoiansen,**
**býráðslimur**

NB.

Góði Schumann
Tá vit seta fram ein spurning og skriva: *serliga um* ***samskiftið*** *millum brúkararnar av fjarhita og felagið ikki er nøktnandi,* merkir tað ikki, sum tú skrivar: *at P/F Fjarhitafelagið ikki er nøktandi.*

# Viðmerking til Ingeborg Vinther

Í Sosialunum 4. okt. ger Ingeborg Vinther forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag, viðmerkingar til samrøðu 27. sept. við Gunnleiv Dalsgarð, formann í Starvsmannafelagnum.

Eg ætli mær ikki at koma inn á tað, Ingeborg Vinther førir fram í tvídrátti hennarar við Starvsmannafelagið, men bert vísa til, at formaður starvsmannafelagsins í grein síni vísir aftur, at nakar verður tvingaður í felagið, heldur ikki dagrøktarar (dagrøktarmammur). Og her kann verða mint á, at tá sáttmála herfyri varð gjørdur við Skála kommunu, vóru tað dagrøktarnir sjálvir, ið ynsktu at gerast limir í Starvsmannafelagnum.

Tað sum eg hinvegin havi hug at gera viðmerkingar til, er tað ið Ingeborg Vinther førir fram um Tórshavnar Kommunala Starvs- og Tænastumannamannafelag. Hetta felag var 1. juli 2000 lagt saman við Starvsmannafelagnum, men havi eg sum formaður í nevndini fyri tey kommunalt settu, ábyrgd av sáttmálanum til 1. mars 2000.

Ingeborg Vinther hevur, av einari ella aðrari orsøk hug til at niðurgera
felagið og fakfelagsarbeiði tess, serliga viðvíkjandi dagrøktarum.

Ført verður fram, at sáttmálin hjá Kommunala Starvsmannafelagnum er fyri skrivstovufólk, og at reglurnar fyri onnur starvsfólk bert er eitt uppískoyti.

Ingeborg Vinther hevur fingið sáttmálan sendandi frá okkum, so hon kennir hann væl og veit at hetta ikki er rætt. Høvuðsparturin av sáttmálanum er galdandi fyri allar bólkar felagsins: Brandmenn, bókavørðir, lívbjargarar, skrivstovufólk, dagrøktarar o.s.fr. Men um so var sum hon sigur, átti hon eisini at ført fram, at Starvsmannafelagið fyrst og fremst er eitt felag fyri skrivstovufólk, tí hesir sáttmálar eru so at siga eins?

At hon kemur við hesum pástandi, tykist mær ikki sørt undarligt, tí Ingeborg Vinther kann ikki í álvara meina, at hon skal avgera hvør er limur
í okkara felag ella uppbýta starvsbólkarnar í A og B limur?

Og hóast nakrir partar av sáttmálanum ikki eru galdandi fyri dagrøktarar, veit Ingeborg Vinther eisini væl, at reglurnar um dagrøktarar als ikki bert eru eitt uppískoyti í sáttmálanum. Millum annað kann nevnast, at dagrøktarar eru umfataðir av frítíðarreglunum, reglunum um setan og uppsøgn, flyta upp eitt stig hvørt ár, umframt vanliga lønarhækkan og fáa 5,5% til eftirløn og trygging. Alt hetta á sama hátt sum aðrir starvsbólkar.

Og tá kommunan nú fyri stuttum avgjørdi, at dagrøktarar skulu fáa løn fyri at ansa egnum børnum, var tað í veruleikanum okkara uppskot - nevndini og dagrøktarunum at takka fyri - sum kommunan tók til sín til sín. Vit hava nevnliga fleiri ferðir ført fram, at dagrøktarum við egnum smábørnum, eiga at fáa fulla inntøku. At fáa hálva løn og minni enn tað, tí ein bert fær t.d. tvey børn at ansa, kunnu tey fægstu klára seg við. Hetta hevur kommunan nú skilt er rímuligt og neyðugt, eisini um tað skuldu fáa fólk at átaka sær hetta arbeiði.

Dagrøktarnir ynsktu fyri 4 árum síðani at koma uppí Kommunala Starvsmannafelagið (aftaná at onnur fakfeløg høvdu víst aftur at taka tey sum limir) og hóast vit langtfrá eru komin á mál, halda vit at vit hava vunnið ikki so lítið uppá hesa stuttu tíð.

Og tað at Ingeborg Vinther fyri dagrøktarnar í Kollafirði, hevur kravt og fingið sáttmála okkara at verða galdandi fyri hesar eisini, vísir at hon ikki heldur hann vera so vánaligan, hóast alt.

Tí er tað einki annað enn orð, tá hon pástendur at Føroya Arbeiðarafelag hevur ærina av, at rættlag er komið á viðurskiftini hjá dagrøktarnum. Tí fyri okkum merkir rættlag í arbeiðsviðurskiftini, at lønar- og onnur viðurskifti eru so góð sum gjørligt, og so kemur limaskapurin kemur í aðru røð. Vit kunnu m.a. vísa á, at vit í fleiri førum hava víst aftur at flyta starvsfólk í okkara felag, bert fyri at hesi skuldu fara niður í løn. Um starvsfólk fáa betri sømdir í øðrum felag, hava vit einki ímóti at tey eru limir har og er hetta eisini sjónarmið Starvsmannafelagsins. Vónandi er raðfestingin av hesum ikki tann øvuga hjá Ingeborg Vinther?

Eg vil at enda siga, at vit einki hava ímóti, at onnur kunnu nýta gott av tí arbeiði vit hava gjørt, tvørturímóti. Og tá dagrøktararnir í Kollafirði herfyri fegnaðust um sáttmála, ið gav teimum lønarhækkan uppá 18%, og sum við smábroytingum var avrit av okkara sáttmála, er hetta teimum væl unt.

Men tað hevðið klætt forkvinnu Føroya Arbeiðarafelags betri, um hon førdi seg fram á meira sømuligan hátt móti øðru fakfeløgum.

*Hoyvík 6. okt. 2000*
**Kartni Ravnsfjall**